


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 10 - 2011

# Vinnan við politikararnar - Stórur tørvur á broytingum

"Fyri at skapa eina góða framtíð í Føroyum mugu broytingar gerast." Ta fatan hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum legði fram spildurnýggjan bókling fyri politikarum og vinnulívsfólki seinnapartin hósdagin. Tað var stúgvandi fult í Kaffihúsinum, tá greitt varð frá innihaldinum í bóklinginum, sum er 75 síður. Í fororðinum verður m.a. víst á, at vøksturin í føroyska búskapinum er ov lítil, og um vit samanbera okkum við Norðurlond, so framleiða føroyingar minni mált sum BTÚ fyri hvønn íbúgva. FAG vil tí við hesum bóklingi vísa á áhugaverdu andsøgnina í, at føroyska framleiðslan er minni, hóast vit eru fleiri, sum arbeiða. Nógv verður gjørt burtur úr fiskivinnuni og almenna geiranum eins og vinnubygnaðinum. Frálanda- og oljuvinnan fylla ikki nógv í bóklingini, men oljan.fo brúkti høvi á fundinum at seta fyriskiparunum spurning um hetta. Tað venda vit aftur til í seinni grein. Sí annars myndafrásøgn frá tiltakinum, sum Vinnuhúsið skipaði fyri í Kaffihúsinum. Mynd - Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Bergur Poulsen restar í. Mynd oljan.fo/Jan Müller